– trygt og ómakaleyst til hús



INNI

# Einastandi samband við náttúruna og við umhvørvið

**Niðast á bakkanum á Velbastað í hesum sera áhugaverda umhvørvinum beint við mølina og við bátahylin standa hesi sera sjáldsomu húsini, ið tala til frið, njótilsi, virkni og virksemi.**









### Uttanfyri og uttanum

Tú koyrir eftir gamla bygdavegnum til Velbastaðar og heilt oman á bakkan gjøgnum bøin og vøkru náttúruna. Tú koyrir heilt oman til bátahavnina og neystini og sera hugnaliga umhvørvið har. Har kanst tú hava og flota bát, og tú kanst sjálv/ur velja, um tú vilt hava bilin ella bátin inn í stóru og góðu garaguna í niðastu hædd. Húsini standa í heilt einastandi náttúruvøkrum og heilt serstøkum umhvørvi beint við strond, fjørð, bátahavn, neyst o.a.

### Ljós og luft – inni og úti

Stóru vindeyguni geva eitt einastandandi útsýni, og sambandi við umhvørvi og náttúru, veður og vind, litir og ljós er heilt einastandandi. Tú kanst standa í stovuvindeyganum ella á útigólvinum / terassuni og fylgja við lívinum við strondina og á sjónum. Har er fuglur, kópur, bátar og skip. Framúrskarandi panoramaútsýni er yvir fjørðin og yvir oyggjarnar. Inni er hugnaligt og fjálgt, og tú merkir veruliga, at sterka og væl bygda húsið verjir teg ímóti náttúrukreftunum. Opið er upp í tróðrið, so opni himmalin uttan gongur aftur í opna hválvinum innan.

### Kjallarin er bilhús og neyst

Í niðastu hædd er stór og frálík garaga, ið eins væl kann nýtast til neyst. Sjálvvirkandi hurðin letur seg upp fyri óteljandi møguleikum fyri at virka og liva við bili, báti og øðrum. Tú kanst ganga beint úr ítrivsumhvørvinum upp í hugnaligu íbúðina. Húsið kann – alt sum tað er – vera ein karmur um eitt gott gerandislív fyri tann einstaka, parið ella lítlu familjuna, eins og tað er einastandandi væl egnað til frítíðarhús.

### Innrætting

Í ovaru hædd er inngongd, gongd, 2 kømur, baðirúm og køkur / alrúm / borðsstova / stova við útgongd til altan / terassu. Í niðaru hædd er inngongd, goymslurúm, stór garaga við el-portri, millumgongd og kamar.

### Fakta

**Adressa** ...........Bakkav. 2, Velbastað
**Byggiár:** ...........1979
**Hæddir:**............2
**Gólvvídd:**..........124 m²
**Grundøki:**.........50 m²
**Hjallur:** .............Nei
**Bilhús:**..............Ja
**Prísuppskot:** ...kr. 1.900.000









PF inni
Niels Finsensgøta 37

Postboks 364
FO-110 Tórshavn

Telefon 35 42 00
inni@inni.fo

Sí fleiri hús á **inni.fo**